


www.oljan.fo

**Jan Müller** 18 - 07 - 2013

# Thor í fýra heimspørtum

Føroyingum møtir tú allastaðni í heiminum hoyra vit oftani tikið til. Hetta má í hvussu er sannast, nú føroyskir sjómenn arbeiða á flestu av heimsins høvum. Við menningini av føroyska frálandaflotanum er tað alt meira vanligt, at føroyskir sjómenn eru til arbeiðis ymsa staðni kring heimin. Største føroyska frálandareiðaríið, Thor arbeiðir í løtuni í fýra ymsum heimspørtum. À heimasíðuni hjá felagnum sæst, at 10 av frálandaskipunum hjá Thor eru til arbeiðis ávikavist í Norðsjónum, Meksikanska Flógvanum, Suðuramerika og í Vesturafrika. Skipini, sum hava sáttmálar í ymsu heimspørtunum, eru í løtuni: Norðsjógvurin: Thor Supporter, Thor Guardian, Thor Chaser og Thor Server. Angola: Thor Pioneer og Thor Assister. Uruguay: Thor Provider: Meksiko Flógvin: Thor Omega. Isle of Man: Thor Goliath. Nú frálandaskipini hjá Thor hava sáttmálar úti í stóru verð er tað sjáldan at síggja tey um okkara leiðir. Men treyðugt so, tað hendir tó, at tey leggja leiðina henda vegin eisini, tá høvi býðst. So var nú um dagarnar, tá Thor Alfa stevndi inn á Fuglafjørð. Annars kann sigast um virksemið hjá Thor, at tað er vaksandi. Í hesum døgum lýsir felagið eftir skipsførarum, stýrimonnum og meistarum til økta virksemið hjá felagnum innan frálandavinnuna.